## Ummæli


Kim Simonsen
kimsimonsen@hotmail.com

# Shooter -Ein óførur spenningsfilmur

**Shooter er um Bob Lee Swagger, sum er ein professionellur super snigskjútti. Hann og partnarin koma illa fyri í Afrika. Partnarin verður dripin og Swagger hevnir seg við at drepa eini 80 fólk, áðrenn hann sleppur til rýmingar.**

Seinni velur hann at gevast í herinum og krógvar seg sum ein annar John Rambo í fjøllunum, men fortíðin kemur at vitja hann. Tað er Obersturin Johnson, sum vil hava hann at hjálpa sær við at verja forsetan, sum teir eru bangnir fyri kann verða myrdur av einum snigskjútta. Hann skal tí skipa fyri, hvussu hann hevði gjørt hetta best, men hann verður snýttur, og nú er alt landið og øll landsins hernaðarfólk, fregnartænastur og løgreglumenn eftir honum.

### Rambo í 2007

Hann er illa særdur og øll leita eftir honum, men hann er ikki so at spæla við hesin Swagger, hann fer sjálvur at jagstra teir, sum vilja honum eftir lívinum og hann endar á hægstu rók.

Sjálvt um Swagger er ein stoltur maður, sum trýr á amerikanska samfelagið, so verður hann eitt offur í einum óhugnaligum stórpolitiskum spæli, har øll eru eftir øllum.

Filmurin Shooter byggir á skaldsøguna hjá Stephen Hunter "Point of Impact", sum varð kallað ein Rambohetja fyri tey, sum hugsa sjálvi.

Shooter minnir um allar hesar samansvørjingarfilmarnar, sum vit kenna frá sjeytiárunum, so sum "Tre døgn for kondor".

Hetta er undirhald av allar besta slag, frá byrjan til endan- ein nærum fullkomin og heilskaptur spenningsfilmur. Mark Wahlberg hevur ongantíð verið betur.

**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| *Bob Lee Swagger* | *Mark Wahlberg* |
| *Nick Memphis* | *Michael Peña* |
| *Oberst Isaac Johnson* | *Danny Glover* |
| *Sarah Fenn* | *Kate Mara* |

**Leikstjóri** Antoine Fuqua. 126 minuttir. Vístur í Havnar Bio frá 2. juni. *Aldursmark 15 ár.*


*Mark Wahlberg hevur ongantíð verið betur enn í leiklutinum sum snigskjúttin Bob Lee Swagger.*




**Prag** er danskur filmur um Christoffers (Mads Mikkelsen) og konuna Maja (Stine Stengade), sum fara til Prag. Pápi hansara er deyður og sonurin skal eftir honum. Giftarmálið gongur alsamt verri. Ein nøkulunda danskur kærleiksfilmur.




**The Last King of Scotland** er ein sera spennandi søguligur filmur, sum gongur fyri seg í Uganda undir stýrinum hjá Idi Amin. Ungi læknin Nicholas Garrigan verður persónligur lækni hjá Amin. Beinanvegin sær hann, at Amin er svakur og síðan gerst søgan ein spenningsfilmur. Megnar Nicolas at sleppa við lívinum?




**Little Children** er ein óunnuligur filmur um miðstættarlív, ótrúskap og lívslygnir. Frank og April eru bæði gift og eiga børn, men trívast ikki í lívinum. Tey byrja at koma saman, og møtast á spæliplássunum við børnunum. Ein harður filmur, við undirtónum av filmunum hjá Todd Solondz (Happyness).




**Hoot** er ein fittur barna- og ungdómsfilmur fyri tey, sum eru millum 12 og 14 ár. Tríggir næmingar í áttanda flokki berjast móti einari fyritøku, ið vil oyðileggja ein skóg, har sjáldsamar uglur búgva.




**Nat på museet** við Ben Stiller er ein nøkulunda skemtifilmur. Hann snýr seg um Larry Daley, sum er ein av hesum ævigu uppfinnarunum, ið ongan vegin koma við nøkrum. Hugskotið til filmin stavar frá einari barnabók eftir Milan Trenc. Flott og heldur tómt, men væl gjørt undirhald.